Álit

í

løgtingsmáli nr. 70/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Frítøka fyri uttanlandsinntøku og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 9. desember 2020 og eftir 1. viðgerð 20. januar 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. januar, 4., 11. og 18. februar 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Áhugafelagið Antares, Felagið Peningastovnar, LÍV, Betri Pensjón, landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, saman við Tryggingareftirlitinum og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við TAKS.

Ein samd nevnd vísir á, at uppskotið um broytingar í eftirlønarlógini hevur tvey endamál:

- at eftirlønargjald av uttanlandsinntøku verður sjálvboðið, um løntakarin antin rindar til Folketrygden NAV, ella løntakarin arbeiðir fyri útlendskan arbeiðsgevara og rindar til eina útlendska eftirlønarskipan, sum TAKS metir nøktandi

- at tryggja javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar

Viðvíkjandi eftirlønargjaldi av uttanlandsinntøku verður mælt til, at persónar, ið arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, verða frítiknir at rinda til eftirløn av uttanlandsinntøkuni, um tað antin verður rindað til Folketrygden NAV, ella tað verður rindað til eina eftirlønarskipan uttanlands, sum TAKS metir er nøktandi. Um viðkomandi harumframt hevur føroyska inntøku afturat uttanlandsinntøku, skal eftirlønargjald rindast í Føroyum av føroysku inntøkuni. Tey við uttanlandsinntøku, ið ynskja at rinda til eftirløn í Føroyum, kunnu framvegis gera tað.
Hesum tekur nevndin undir við.

Fíggjarmálaráðið mælir í skrivi til Fíggjarnevndina til eina broyting í lógaruppskotinum, sum letur landsstýrismannin varðveita eina kunngerðarheimild, sum annars ótilætlað verður strikað úr lógini. Heimildin snýr seg um, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvat er at meta sum nøktandi eftirlønarskipan uttanlands. Hesum tekur nevndin undir við.

Viðvíkjandi at tryggja javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar verður í uppskotinum skotið upp, at somu ásetingar verða galdandi fyri peningastovnar sum fyri aðrar eftirlønarveitarar, og hesum tekur nevndin undir við.

Við hesum viðmerkingum setir ein samd nevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 2 verður í nr. 18 sum 2. pkt. sett: “Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvat er at meta sum nøktandi eftirlønarskipan uttanlands.”

Viðmerkingar:

Við uppskotinum frá landsstýrismanninum verður § 1, stk. 9 í eftirlønarlógini strikað, men við tí fellur eisini heimildin hjá landsstýrismanninum at nágreina, hvat er at meta sum ein nøktandi eftirløn burtur.

Í § 1, nr. 2 í uppskotinum er ásetingin um uttanlandsinntøkur umorðað. Endamálið við nýggju orðingini er at betra um møguleikarnar fyri at kunnu frítaka persónar, sum arbeiða fyri arbeiðsgevarar við heimstaði uttanlands, og sum rinda til eina eftirlønarskipan uttanlands, frá skylduni eisini at rinda til eina eftirlønarskipan í Føroyum av somu inntøku.

§ 1, nr. 2 í lógaruppskotinum hevur ikki eina slíka heimild, men hon verður við hesum broytingaruppskoti sett inn í lógaruppskotið.

Páll á Reynatúgvu, Ruth Vang og Kristin Michelsen hava harumframt hesar viðmerkingar:

Til tess at tryggja, at tað ikki verður gjørdur munur á teimum krøvum, ið verða sett til ymsu samfelagsbólkarnar í Føroyum í mun til eftirlønarlógina, vilja undirritaðu leggja dent á týdningin av góðum myndugleikainnliti í, og eftirliti við teimum útlendsku eftirlønarskipanum, sum verða fevndar av undantakinum at rinda til eftirløn sbrt. eftirlønarlógini.

Hetta er eitt nú týdningarmikið í mun til at tryggja, at borgarar ikki sleppa undan lógarásettu eftirlønaruppsparingini fyri á ellisárum at kunna troyta almenna útgjaldsmøguleikan í Føroyum.

Harumframt verður víst á, at tað undir viðgerðini í nevndini er komið fram, hvør ymisleiki kann uppstanda, tá tænastuveitarar á eftirlønarøkinum, peningastovnarnir og eftirlønarfeløgini, eru undir ymiskum eftirliti; tryggingareftirlitið, sum hevur eftirlit við eftirlønarfeløgunum, er føroyskt málsøki, meðan fíggjareftirlitið, ið hevur eftirlit við peningastovnunum, er felags málsøki.

Vit eiga sum føroyingar at tryggja okkum, at evsta ábyrgd og eftirlit við útbodnum tænastum í Føroyum altíð verður fyriskipað undir føroyskari ábyrgd. Sum minsta mát eiga vit at hava innlit í og luttaka í eftirlitsarbeiðinum, so ein Eik-líknandi støða ikki aftur dettur niður yvir okkum á nátt.

Undirritaðu mæla tí landsstýrinum til beinanvegin at fara undir samráðingar við danir fyri at tryggja neyðuga føroyska innlitið og eftirlitið við peningastovnunum í Føroyum.

Við hesum viðmerkingum og broyting tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 8. mars 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	